## Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# TROYTA AVMARKAÐA MARKNAÐIN

At tað kann vera trupult at reka fjølmiðlavirksemi hava seinastu dagarnir víst. Í síðstu viku steðgaði ungdómsportalurin, Mess, tí áhugi ikki var at lýsa, segði stjórin, samstundis sum hann bedýraði, at ókeypis vikublaðið V framhaldandi fór at koma út.

At hetta seinna var ein sannleiki við modifikatiónum gekk sjón fyri søgn, tá hann fáar dagar seinni segði øllum starvsfólkunum upp og steðgaði blaðnum.

Í miðlum hevur nógv verið gjørt nógv burtur úr hesum, og víst verður á, hvussu syndarligt tað er, at tað ikki ber til við einum ungdómsportali. Og tað er spell, at lýsarar ikki hava áhuga í tí smala marknaðinum, sum ungdómurin er.

Eyðvitað er tað trupult at geva út ókeypis bløð hvørja viku. Tað eigur ikki at geva nakran hvøkk hjá tí, ið kennir hesa vinnugrein. Vit hava tvær gamlar fyritøkur, sum hava verið á marknaðinum í ávikavist 133 ár og í 83 ár, Dimmalætting og Sosialin/Miðlahúsið. So høgur aldur gevur sjálvandi royndir og vísdóm - sum verða borin næsta ættarliði.

Kortini koma nýggir aktørar á marknaðin - sum skulu verða betri og bíligari. Kanska onkur heldur uppá, at gomlu miðlafyritøkurnar taka alt ov høgar prísir, og at vit ikki duga eins væl, sum hesi vællærdu fólkini, sum siga seg seta búskaparmodellið um útboð og eftirspurning í hásæti.

Og so koma umberingar. Men tað sum verður gloymt í øllum hesum er tað mest grundleggjandi av øllum: *Púra vanligur handilsskapur!*

Heldur enn at dumpa prísir og undirbjóða hvønn annan, so eiga allir aktørar at virða hvønn annan og virða teir prísir, sum eru á marknaðinum við einum seriøsum prísútrokningargrundarlagi. Slík undirbjóðing, sum vit hava sæð seinastu árini førir til reinu armóð - tað vísa allir húsagangirnir og tær tíggjutals milliónirnar, sum gomlu partaeigararnir í Dimmalætting hava mist.

At Mentamálaráðið letur Kringvarpið kappast við okkum á so ójøvnum grundarlag, tað eigur ikki at bera til í einum samfelag, har vit hava skipaðar kappingartreytir.




Men tað verður gjørt við vælsignilsi frá landsstýriskvinnuni í mentamálum.

Vit hava ein avmarkaðan lýsingarmarknað. Men hann kann skipast, um vit hava eitt seriøst, gjøgnumskygt útrokningargrundarlag fyri prísir, tað kunnu aktørarnir á marknaðinum tryggja.

Men tað eru ómentaðir politikarar, sum lata eitt alment fíggjað public service kringvarp kvala privatar miðlar - tí tá hevur mentanin mist nógv.

**Miðlar eiga at virða púra vanligan handilsskap**



*Ein lítil møguleiki er fyri, at Etika fer at halda fram við øðrum eigarum, sigur Johannes Jensen*

# Etika í Danmark hevur snarað lykilin

Tað eydnaðist ikki at reka føroysku sushi-matstovuna í Keypmannahavn, sum læt upp í januarmánaði í ár. Tí hava eigararnir gjørt av at steingja matstovuna.

- Vit hava tíverri gjørt av at lata Etika í Danmark aftur, sigur Johannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, sum er ein av eigarunum av føroysku sushi-matstovuni í Keypmannahavn.

Tað var í januar í ár, at Etika lat upp - grundað á væleydnaðu royndirnar hjá Etika í Føroyum.

- Etika í Danmark liggur í »minefeltet«, sum økið verður kallað, og byggir virksemið hjá Etika í Danmark tí á eitt væl breiðari grundarlag enn tað, sum Etika í Føroyum byggir á, sigur Johannes Jensen, sum vísir á, at flestu viðurskiftini hava gingið væl og eydnast væl við Etika í Danmark.

- Eitt nú hevur matstovan fingið rós og havt nógv vitjandi. Men álvarsamir trupulleikar hava tó verið - eitt nú við leiðsluni á staðnum, og førdi hetta til, at nýggj leiðsla varð sett, sigur hann.

Men nú er so kortini avgerð tikin um steðga, meðan aðrir møguleikar verða kannaðir saman við útleigara og nýggjum lokalum íleggjarum, og tí er ein lítil møguleiki fyri, at matstovan heldur fram undir nýggjum formi og kanska nýggjum eigarum.

Etika í Keypmannahavn og Etika í Havn hava tó einki uttan navnið og konseptið í felag, og Etika á Áarvegnum í Havn gongur væl betri enn væntað, sigur Johannes Jensen.



## Aftursvar til Firouz Gaini

ÁRNI GREGERSEN
KJAK Á SÍÐU 35



## Dýrt verður dýrari

JÓNLEIF JOHANNESEN
KJAK Á SÍÐU 13

# Savna pengar til Sandoyartunnil



Fríggjakvøldið skipa politisk ungmannafeløg fyri stuðulstiltaki heima á Sandi til frama fyri Sandoyartunnilin.

Tað er felagsskapurin PolUng - sum er Sosialistiskt Ung, Ung fyri Miðflokkin, Unga Sambandi og Unga Tjóðveldi, sum skipa fyri hesum stuðulstiltaki fyri Sandoyartunlinum. Tiltakið verður fríggjakvøldið klokkan 20 í Virkinum heima á Sandi.

Á skránni verður tónleikur við bólkinum Gypsy Train, framløgur frá ungmannafeløgunum, opið kjak og eisini spennandi kviss.

- Sjálvandi gongur talvan, og peningurin fer óskerdur til Sandoyartunnilin. Ung sum gomul eru øll vælkomin til kulasta stuðulstiltak fyri Sandoyartunnilin nakrantíð, siga ungmannafeløgini, sum tó einki siga um, hvørt tiltakið er meint sum skemt ella álvara.

**Sosialurin** Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*